## vilja heldur hava gras

Níggju av tíggju donskum spælarum vilja ikki, at tað skal verða loyvt at spæla altjóða dystir og grasilíki. Hetta vísir ein spurnarkanning, sum danska spælarafelagið hevur gjørt.
Donsku spælararnir halda, at spælið verður betri á veruligum grasi. Hartil bera nógvir spælarar eisini ótta fyri, at gummikúlurnar á graslíki innihalda eiturevni, soleiðis sum svensk kanning í fjør bendi á.
Samstundis meta spælararnir tó, at grasundirlagið á donsku vøllunum eigur at betrast munandi,.

**-mørk**

## Føroya Tele heldur fram í B36

Longu nú hava føroyameistararnir longt um sponsor-sáttmálan við Føroya Tele, sum annars var galdandi til 31. desember í ár
Hesum hava partarnir boðað frá í tíðindaskrivi til føroysku miðlarnar. Føroya Tele hevur í tvey ár verið høvuðssponsor hjá besta mansliðnum hjá B36, og til 2009 verður felagið nú eisini sponsor hjá kvinnuliði felagsins.
Richard Mortensen, stjóri í FT-Samskifti sigur, at jaliga samstarvið partanna millum, saman við góðu úrslitunum hjá felagnum, hevur gjørt, at Føroya Tele og B36 longu nú eru samdir um víðari samstarv fram til 2009. Somuleiðis fegnast vit um, at sáttmáli nú eisini er gjørdur við 1. deild kvinnur.
Eisini Kristjan á Neystabø, stjóri í FC Tórshavn er fegin um nýggju avtalurnar og samstarvið við Føroya Tele. Hann sigur, at tað ein stór viðurkenning av avrikunum hjá B36, nú stuðulsavtalurnar longu eru komnar upp á pláss fyri komandi árini. **-mørk**

### Statoil kring Føroyar, støðan

**Vaksin**

| Nr. | Navn | Tíð |
|---|---|---|
| 1 | Hafsteinn Ægir Geirsson | 3.21,32 |
| 2 | Gunnar Dahl Olsen | 3.23,10 |
| 3 | Kári Brynjólfsson | 3.24,34 |

**Kvinnur**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Christine McLean | 2.31,08 |
| 2 | Jenny Wright | 2.31,44 |
| 3 | Caroline Jane Simpson | 2.44,10 |

**Unglingar**

| | | |
|---|---|---|
| 1 | Torkil Veyhe | 2.13,04 |
| 2 | André Tolstoj | 2.15,41 |
| 3 | Sigmund Olsson | 2.21,36 |

## U15 í finaluni í Aberdeen

Hósdagin spældi føroyska U15 landsliðið hálvfinalu í Aberdeen International Football Festival. Føroyar vunnu dystin ímóti Hetlandi og spæla finalu leygardagin

U15 landsliðið vann 4-1 á Hetland, eftir at støðan hevði verið 2- 0 í hálvleikinum. Málskjúttar vóru Gilli Sørensen úr TB, sum gjørdi tvey mál, Remi Langgaard úr NSÍ(myndin) og Heini Vatnsdal úr TB/VB/S.

Úrslitið hevur við sær, at Føroyar skulu spæla finalu ímóti Ross County leygardagin kl. 12.00.
-mørk

## U17 landsliðið eisini komið í finaluna

Føroyska U17 landsliðið í fótbólti spældi seg í kvøld í finaluna í Aberdeen International Football Festival
Føroyar spældu ímóti felagnum Keith í hálvfinaluni í kvøld, og Føroyar vunnu dystin 3-1.

Páll Klettskarð úr KÍ (myndin) skoraði tvey mál, og Erling Jacobsen úr GÍ gjørdi tað triðja.

Finalan hjá U17 landsliðnum verður leygardagin kl. 14.30.
-mørk

## Anelka vil úr Fenerbache

Eitt av stóru nøvnunum, sum eru á liðnum hjá Fenerbache, ið B36 skal spæla móti mikukvøldið, er fraklendingurin, Nicolas Anelka.

Anelka hevur gjøgnum ár og dag skapt hópin av rumbli í enskum, sponskum og fronskum fótbolti, og nú er líkt til, at sama søgan endurtekur seg í Turkalandi.

Enskir fjølmiðlar vita at siga, at Anelka hevur tosað við Harry Redknapp og Portsmouth, sum sigst vera til reiðar at rinda Fenerbache 90 mió kr. fyri spælaran. Verður skiftið veruleiki, verður Portsmouth fjórða enska felagið hjá spælaranum, ið áður hevur spælt fyri Arsenal, Liverpool og Manchester City.

Á heimsíðuni, www. fenerbache.org, verður tó avsannað, at Anelka skal nakran veg, og venjarin hjá felagnum, Zico, staðfestir, at hann ikki hevur nakrar sum helst trupulleikar av Anelka.

# Hafsteinn økti um leiðsluna




*Í løtuni liggur íslendski Hafsteinn Ægir sera væl fyri í Statoil Kring Føroyar. Leygardagin verður væntandi avgerandi teinurin, tá súkklararnir í tveimum umrøum skulu um Hestin við Sumba. mynd: www.tsf.fo*

**Íslendski Hafsteinn Ægir Geirsson skrædd seg leysan av hinum súkklarunum, tá drúgvi teinurin í Eysturoynni varð súkklaður í dag**

SÚKKLING
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Hafsteinn kom á mál góðan minutt undan Gunnari Dahl Olsen, sum eisini er næst fremsti súkklarin í kappingini.
Hóast talan bara var um fyrstu veruligu etapuna í kappingini, so líkist sigurin í dag einum avgerandi fyrimuni hjá sterka íslendinginum, sum í samlaðu støðuni er 1 minutt og 38 sekund framman fyri Gunnar Dahl Olsen. Ein tíðarmunur, sum er hampuliga stórur, og sum ber við sær, at íslendingurin nú í nógv størri mun kann hugsa taktiskt á teinunum, sum eftir eru.
Fríggjadagin er tíðarkoyring á Sandi, og har verður Hafsteinn eisini roknaður sum favorittur, og kann hann tí helst leggja nøkur sekund afturat leiðsluni hjá sær.
Leygardagin verður súkklað á Suðuroy, har talan er um 77 strævnar kilometrar, og sunnudagin er tað so Streymoyggin, sum leggur asfalt til kappingina.

### Hesturin avgerandi

Fremsti føroyingurin í kappingini er Gunnar Dahl-Olsen, sum er á øðrum plássi. Og skal hann gera nakað við íslendska oddafiskin, skal hetta helst gerast í Suðuroynni. Her gongur leiðin av Tvøroyri suður til Sumbiar, áðrenn leiðin aftur gongur til Vág. Serstakliga verður tað her returferðin um Hestin á Sumbiarleiðini, sum verður avgerandi. Tá verður í tveimum umførum súkklað upp í góðar 400 metrar, og tað er ein brekka, sum veruliga kann skapa mun í feltinum.
Hinvegin, so var Hafsteinn Ægir sterkasti súkklarin, tá farið var um Eiðisskarð hósdagin, og tí eru útlitini hjá Gunnari kanska ikki tey allar bestu.

# Tveir nýggjur brasiliumenn á Toftum




*Tey trý nýggju trumfkortini, sum B68 fer at spæla út eftir summarsteðgin. Anderson, Hendrik Rubeksen og Alex*
*Mynd: www.b68.fo*

**Anderson er nú aftur á Toftum, og við sær hevur hann eisini eldra beiggjan, Alex**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*

Á Toftum vilja tey ikki lata standa til, nú felagið aftur er í vanda fyri at missa nýafturvunna sessin í bestu mansdeildini. Seinasta vikuskiftið stóð greitt, at Hendrik Rubeksen verður leigaður úr HB restina av kappingarárinum, og nú leggjast so tveir brasiliumenn afturat hópinum.
Annar av hesum – Anderson – er ikki ókunnugur á Toftum. Hann kom til felagið fyri tveimum árum síðani, og tá var sera nær við, at hann gjørdist maðurin, sum bjargaði tilveruni hjá B68 í fremstu røð.
Og vandamikli áleyparin hevur eisini eldra beiggja sín við sær. Hesin eitur Alex, og ger vanliga um seg á framrættaða miðvøllinum, so á Toftum vóna tey, at tey við nýggja styrkinum hava fingið eina framrættaða trio, sum kann skjóta felagið longur upp á formula-talvuni.